# TB og SÍ vunnu seg í steypafinaluna

**Hóast fýra mánaðir eru, til steypafinalurnar í flogbólti verða spældar, hava TB-kvinnurnar og SÍ-menninir longu spælt seg í finalurnar hjá ávikavist kvinnum og monnum**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Er tað nøkur ítróttagrein, sum er skjót á sjóvarfallinum, má tað vera flogbóltur. Longu sunnudagin fingu tvey feløg tryggjað sær pláss í steypafinaluni, sum ikki verður fyrr enn leygardagin 15. februar - næsta ár…

Tað er einki óvanligt í tí, tí tað eru FK-kappingin um heystið og NS Cup-kappingin beint eftir nýggjar, ið virka sum eitt slag av hálvfinalum í flogbóltskappingini, og vinnararnir í teimum kappingunum fáa afturfyri eitt pláss í sjálvari steypafinaluni.

FK-kappingin varð spæld um vikuskiftið. Leygardagin møttust meistaraliðini hjá kvinnum í Gundadalshøllini og hjá monnum í Hoyvíkshøllini, og sunnudagin vóru finalurnar spældar í Gundadalshøllini. Kvinnurnar spældu sítt innleiðandi umfar í tveimum bólkum, har TB, ÍF og Fleyr vóru í øðrum bólkinum, og Mjølnir, Dráttur og KÍF í hinum bólkinum.

Tvey tey bestu møttust so í hálvfinalunum, og vinnararnir av teimum endaðu í finaluni sunnudagin. TB vann 2-0 í sínari hálvfinalu á Drátti og ÍF vann 2-0 á Mjølnir, so tí komu TB og ÍF í kvinnufinaluna.

Hjá monnum eru fimm lið í meistaradeildini, og tey spældu tí øll móti øllum - Fram, Fleyr, SÍ, ÍF og Mjølnir - og tvey tey bestu komu í finaluna. ÍF vann, uttan at tapa nakran dyst, og SÍ gjørdist nummar tvey, við bara at tapa sín dyst móti ÍF.

### TB sannførandi

Kvinnurnar hjá TB, sum síðsta kappingarár vunnu »greipuna«, vóru rættiliga sannførandi í finaluni móti ÍF, sum tær eisini vunnu 3-0. Settúrslitini vóru 25-17, 25-20 og 25-22.

Sum heild var TB nógv tryggari í grundspælinum, og haraftrat hevði ÍF ofta langar løtur, har servumóttøkurnar als ikki riggaðu, og tað var nakað, tær í TB vóru skjótar at sekta.

Hvørja ferð kom ÍF kortini fyri seg aftur, men sum oftast so mikið seint, at TB longu var farið avstað og kundi avgera settini, sjálvt um ÍF hevði fingið eisini sítt spæl at koyra.

At TB hevur fingið Gudrid Nolsøe aftur, umframt at Popuvic-systrarnar vísa styrki, er ein ábending um, at TB ikki verður lætt at syfta í vetur. Men eisini ÍF vísti í kappingini um vikuskiftið góðar taktir, og útlendski styrkurin á liðnum er góður.

### SÍ kendi løtuna

Hóast menninir hjá ÍF í innleiðandi kappingini høvdu vunnið allar dystirnar og ikki minst tann móti SÍ, so vóru tað sørvingar, ið komu burtur úr finaluni sum vinnarar við einum 3-1 sigri.

Men settini vóru jøvn, sum úrslitini eisini vísa: 19-25, 25-22, 29-27 og 27-25. Til tað síðsta royndi ÍF at bíta frá sær, og í báðum teimum síðstu settunum mátti spælast upp um 25, áðrenn vinnarin var greiður.

Munurin á liðunum var uttan iva Rajko Petrovic, ið spældi ein ótrúliga góðan finaludyst. Hann vann alt, sum hann sló - bæði frammarlaga og aftarlaga á vøllinum - og ÍF fekk ongantíð ordiliga fatur á honum í øllum dystinum.

Yvirhøvur stríddust teir á SÍ-liðnum sera væl og vunnu servurnar aftur beinanvegin, so ÍF ongantíð slapp í gongd. Onkur sett fekk ÍF sloppið sær framum við fýra ella fimm málum, men so svaraði SÍ aftur og helt leiðsluni til endans.







# Allan helt leingi tørn

**Sera ivasamt brotsspark feldi Luksemborg ímóti Danmark, og Noreg vann framúr sigur í Rumenia**



*– Frá tíðini sum landsliðsvenjari í Føroyum veit eg, at smáu fótbóltstjóðirnar fáa ikki nógv frá dómarunum – serliga ikki á útivølli, segði Allan Simonsen eftir dystin hjá Luksemburg móti Danmark*

EM-UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*

2-0 tap á heimavølli ímóti Skotlandi var vónbrot fyri Ísland. Sviar megnaðu ikki meiri enn 1-1 á heimavølli ímóti Ungarn, og tað var eisini vónbrot. Ungarn er í fótbólti ikki tað, sum landið var nógvu tey fyrstu árini eftir 2. heimsbardaga, og Svøríki stóð seg væl í HM endaspælinum í summar.

Svøríki hevði nógv mesta partin av spælinum, men teir komu ongantíð orduliga yvir skelkin, at Ungarn í 7. minutti legði seg á odda.

Svøríki hevði nógvar møguleikar, men tað var ikki fyrrenn í 76. minutti, at teir 36.000 áskoðararnir í oysandi regninum og bara 3-4 hitastigum á Råsunda sóu Zlatan Ibrahimovic javna til 1-1. Málskjúttin fekk ikki høvi at fegnast saman við liðfeløgnum um málið. Hann brast saman við ungverska málverjanum og varð borin av vøllinum.

Endaspælið í Portugal er kámt fyri svium, sum í fyrsta umfarinum bara megnaðu 0-0 í Riga ímóti Letlandi.

Undan dystinum ímóti Ungarn varð nógv tosað um, at álopsfelagin og kappingarneytin hjá Toda Jónsson í FCK, Jörgen Pettersson, aftur var úttikin til svenska landsliðið. Men leygardagin var hann 19. maður og sat harvið millum áskoðararnar. Vongverjin hjá FCK, Tomas Antonelius var ímillum teir fyrstu ellivu. Men hann var vongverji í vinstru og ikki á vanliga plássinum í høgru, og avrikið varð ikki mett at hava verið meiri enn passaligt.

### Tríggir góðir sigrar

Donsku áskoðararnir vóru ikki til málveitsluna í Parkini, sum teir høvdu vónað. Luksemborg helt tørn fyrsta lítla tíman. Tá Danmark kom á odda, var tað við brotssparki, og Morten Olsen og øll hini vóru samd við Allani Simonsen í, at talan var um sera ivasaman dóm. Jon Dahl Tomasson skoraði úr ellivu metrum, og hann átti uppleggið, tá Ebbe Sand stútaði til 2-0.

– Frí tíðini sum landsliðsvenjari í Føroyum veit eg, at smáu fótbóltstjóðirnar fáa ikki nógv frá dómarunum – serliga ikki á útivølli, segði Allan Simonsen eftir dystin.

Í Bukarest var tjóðarvøllurin eitt stórt runudýki. Men tað mundu norðmenninir leggja vertin á. Á heimavølli ímóti Danmark javnaðu teir til 2-2, tá tað vóru tjúgu sekund eftir. Leygardagin var aftur lítið eftir, tá teir fingu sigursmálið i dysti, sum alt bendi á skuldi enda málleysur. Steffen Iversen var maðurin, sum alt Noreg fegnaðist um, tá sjey minuttir vóru eftir.

Finnland vann sannførandi á heimavølli ímóti Aserbadjan. Hyppiä úr Liverpool staðfesti við stútara 3-0 sigurin. Mest merkisverda við dystinum í Helsingfors var, at fyrsti málverjin hjá Aserbadjan ikki slapp í land í Finnlandi. Hann hevði einki pass, og so var einki annað at gera enn at senda hann til hús. Umframt til atgonguskjal til landið, so verður passið í fótbóltshøpi víst sum samleikaprógv. UEFA umboðið, dómarin og umboð fyri fótbóltssambondini sita nakrar tímar undan dystarbyrjan á fundi og lesa passini, og tá er ikki gamans leikur, um ikki alt er, sum tað eigur at vera.

# Týskland er í aldudali

**Hóast teir eru sjálvsagdir favorittar ímóti Føroyum, so heldur Rudi Völler, at tað eru tjúgu ár síðani, at tað kundi tosast um, at dystir vóru vunnir undan dystarbyrjan**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jóannes Hansen*

Hóast týskarar í summar vóru í finaluni í HM endaspælinum, so verður spurningur settur við, hvussu væl Týskland í løtuni er fyri í fótbólti. Víst verður m. a. á, at Bayern München hongur í klønum tráði í Europa Cup fyri meistarar. Eftir at helmingurin av dystunum í innleiðandi umfarinum eru spældir, er Bayern so spert, at teir skulu vinna allar tríggjar dystirnar, sum eru eftir, um teir skulu sleppa í næsta umfarið, sum teir higartil hava verið við í hvørja ferð

Bayer Leverkusen er aftast í sínum bólki, meðan Borussia Dortmund er á veg í millumumfarið. Í fjør misti Týskland eitt av fýra plássum í europeisku meistarakappingini, tí úrslitini høvdu ikki verið nóg góð.

### Lítið sannførandi

Fríggjakvøldið fyrireikaði týska landsliðið seg til dystin ímóti Føroyum í annaðkvøld. Teir spældu venjingardyst í Bosnia. Tað gekk ikki meiri enn passaligt hjá týskarunum, sum ikki vóru óhepnir at røkka 1-1. Venjarin Rudi Völler – Rudi Riese ella Rudi tann Stóri, sum týskararnir altíð nevna hann – var ikki nøgdur við spælið, sum hann í 1. hálvleiki segði hevði verið vánaligt.

– Hetta var ikki sannførandi. Onkur sigur kanska, at mótstøðan mikukvøldið ímóti Føroyum verður lítil, og at tað harvið verður lætt hjá okkum at vinna og tað stórt, men tann tíðin er 15-20 ár burtur, tá smáu fótbóltstjóðirnar høvdu tapt undan dystinum ímóti stórum tjóðum sum eitt nú Týsklandi.

Týskarar halla sær at, at fleiri av góðu spælarunum ikki vóru við í Bosnia. Michael Ballack, sum er høvuðsálitið á miðvøllinum, var sjúkur, og arbeiðshesturin Dietmar Hamann var skaddur.Ungu og evnaríku spælararnir Christoph Metzelder og Christian Ziege vóru skaddur.

Í HM endaspælinum í summar vann Týskland 8-0 á Saudi Arabia. Uttan mun til, hvat lið teir senda á vøllin í annaðkvøld, so verða teir stórfavorittar ímóti Føroyum. Tað heldur Henrik Larsen eisini.

– Vit høvdu ongan mann í Bosnia. Vit fyrireikaðu okkum til dystin í Litava leygardagin, og eg veit eisini, hvat týskararnir standa fyri. Tað vístu teir í 2-0 sigrinum í Litava 7. september, staðfestir venjarin hjá føroyska landsliðnum.